# Tryggjar vágbingum reint vatn nógv ár fram í tíðina

**Í samstarvi við SEV fær Vágsbygd nú eisini vatn úr vøtnunum omanfyri Vág. Ein framkomin skipan, har ventilar og pumpur kunnu fjarstýrast av kommunuskrivstovuni tryggjar nú vágbingum ivaleyst av reinum vatni**

VATNVEITING
*Áki Bertholdsen*



*Mikudagin tók Vágs Kommuna eina nýggja vatnskipan í nýtslu sum í samstarvi við SEV tryggjar bygdini nóg mikið av vatnið rættiliga nógv ár fram í tíðina. Í tí sambandi vóru býráðslimir og hugdu at skipanini og her eru teir við tann eina brunnin uppi á Hálsunum.*

Vatn hevur í mong ár verið ein stórur trupulleiki í Vági, tí tað skuldi ikki rættiliga turkur ella frost til, so sótu fólk við ongum vatni.

So hvørt sum tann ógvuliga vatnkrevjandi fiskivinnan varð bygt út í Vági, gjørdust hetta alsamt ein veksandi trupulleiki.

Tí hevur Vágs Kommuna seinastu árini lagt stóra orku í at tryggja bygdini nóg mikið av reimum vatni.

Eitt rættiligt frambrot á hesum øki hendi fyri einum tveimum árum síðani, tá ið Vágs Kommuna fekk í lag avtalu við SEV um at taka vatn úr stóru vøtnunum omanfyri Vág, Ryskivatni, Miðvatni og Vatninum í Tindalíð, ella Ovasta Vatni, sum tað eisini verður nevnt á mannamunni.

Hendan avtalan ber í sær, at tá ið hinar vatngoymslurnar í Vági eru turrlagdar, ber til at taka vatn úr vøtnunum fyri at tryggja bygdini nóg mikið av reimum vatni.

Síðani er eitt umfatandi arbeiðið gjørt fyri at fáa skipanina at rigga og nú er komið á mál við vatnrørum, brunnum, pumpum og ventilum og aðrari útgerð.

Samstundis, sum hetta er gjørt, hevur SEV eisini lagt veiting fyri at savna vatn av vátlendinum á fløtuni omanfyri Vág og tað verður nú eisini veitt vestur í Ryskivatn

Og mikudagin varð skipanin tikin í nýtslu.

Og hetta er ein ógvuliga framkomin skipan, tí hon kann fjarstýrast so at tað ber til at tendra og sløkkja pumpur, og skrúva ventilar frá og fyri á eini teldu kommunuskrivstovuni í Vági.

Tað er Svenn Brimheim á verkfrøðingafelagnum Martin E. Leo í Havn, sum hevur staðið fyri projektinum, men allar tær elektrisku stýringarnar, telduforrit og annað í tí sambandinum, hevur Heri Mortensen í Vági gjørt. Sjálvum arbeiðnum hevur Hermann Christiansen staðið fyri.

## Nóg mikið av reimum vatni

Jógvan Krosslá, borgarstjóri, sigur, at hetta er ein stór verkætlan, sum hevur kostað kommununi einar tríggjarm illiónir og tá eru reinsiverkini ikki tald við.

Tilsamans hevur kommunan lagt tríggjar kilometrar av rørum niðan í Ryskivatn, sum Miðvatn og Ovasta Vatn renna oman í frammanundan, umframt brunnar, pumpur og ventilar.

– Eftir avtaluni við SEV, kunnu vit taka 190 tons um tíman úr vøtnunum, umframt tað, sum tað ber til at fáa av vatngoymslunum, sum vóru frammanundan.

Í løtuni kunnu vit taka 110 tons um tíman frá SEV, men verður tað neyðugt, kann ein pumpa setast upp afturat, so at tað fáast 140 tons frá SEV. Og stendur ordiliga á, ber til at byggja enn meiri út, so at tað fáa 190 tons um tíman frá SEV.

–Avtalan við SEV er gjørd fyri at tryggja kommununi eina eykagoymslu, sum vit hava at taka til, tá ið turkur ella frost er, sum ger, at tað ikki ber til at fáa vátn úr hinum goymslunum.

– Samstundis hevur kommunan eisini lagt nýggja vatnveiting í allari bygdini, so nú eru vit heilt væl fyri við nóg mikið av reinum vatni og nýggjum rørum, rættiliga nógv ár fram í tíðina, sama, hvussu nógvur vatnkrevjandi ídnaður tekur seg upp.

Mett verður, at vágbingar brúka eini 1.900 tons av vatni um samdøgurið, men bara avtalan við SEV tryggjar bygdini 2.640 tons um samdøgurið, sum er, og verður tað neyðugt, kann hon byggjast út til at geva 3.360 tons um samdøgurið við eini pumpu afturat, men við fleiri útbyggingum, kann avtalan við SEV geva 4.560 tons um samdøgurið, umfamt tær goymslur, sum annars eru í bygdini.

Sum er klára reinsiverkini at reinsa 3.360 tons um samdøgurið.

Í Vági hava fleiri privat vatnfeløg verið, men tey flestu eru nú bundin í kommunalu vatnveitingina, men eini tvey eru eftir, sum ikki hava bundið í og sum tískil heldur ikki fáa reinsað vatn



*Nýggja vatnskipanin í Vági er rættiliga framkomin og kann fjarstýrast av eini teldu á kommunuskrivstovuni. Her eru býráðslimir á pumpustøðini við Ryskivatn, har Heri Mortensen greiðir frá um skipanina. Tað er hann, sum hevur gjørt el-stýringarnar og telduforritini og Svenn Brimheim hevur gjørt sjálvt projektið. Við nakkanum til er tað Frank Anthoniussen, býarverkfrøðingur, Heri Mortensen, verkfrøðingur, Herman Christiansen, arbeiðsformaður, Jógvan Krosslá, borgarstjóri og aftanfyri hann, Páll Augustinussen, býráðslimur. Fremst sæst akkurát Martin E. Leo, verkfrøðingur*

# Vilja fegin hava samstarv fyri at bøta um trygdina á sjónum

**Fjarskiftiseftirlitið vil fegið hava samstarv við Fiskiveiðieftirlitið fyri at bøta um trygdina á sjónum, sum er syndarlig á summum økjum**

TRYGD Á SJÓNUM
*Áki Bertholdsen*

Nú er tað sumt sum bendir á, at Fjarskiftiseftirlitið og Fiskiveiðieftirlitið fara at ganga saman í samstarv fyri at bøta um trygdina á sjónum.

Og hetta man verða harðliga tiltrongt, tí á summum økjum stendur syndarliga illa til við trygdini á sjónum.

Eitt nú vísti Fjarskiftiseftirlitið á, at tað eru fleiri og fleiri útróðrarbátar, sum ikki hava kravdan vhf sendara umborð. Og har sendarin er umborð, er tað ein veksandi trupulleiki, at menn ikki duga at brúka útgerðina.

Hetta er ein veksandi trupulleiki, sum er til vanda fyri trygdina, bæði hjá teimum sjálvum, men eisini hjá øðrum, tí brúka teir ikki vhf sendaran, kunnu teir heldur ikki koma øðrum til hjálpar.

Elmar Højgaard, leiðari segði á Sosialinum í gjár, at Fiskiveiðieftirlitið hevur eftirlit við um útgerðin er umborð.

Men tað er Fjarskiftiseftirlitið, sum skal kanna eftir, um bátarnir og menninir, eisini hava tey neyðugu prógvini og og loyvini. tvs bæði frekevensloyvi til sendaran og prógv til at brúka sendaran.

Elmar Højgaard á Fiskiveiðieftirlitinum vísti samstundis á, at tað hevði verið frammi um at skipa samstarv ímillum Fjarskiftiseftirlitið og Fiskiveiðieftirlitið um at fáa betri skil á hesi viðurskfti. Fyribils var onki komið burturúr, men hann metti ikki, at tað skuldi verið trupult at fingið eina slíka avtalu í lag, so at vaktarskipini eisini fóru at kanna eftir um menn, sum vóru við skipum og bátum, eisini høvdu neyðug loyvi og prógv.

## Samstarv vælkomið

Don Petersen, samskipari á Radioeftirlitinum váttar, at tað er tað, sum skal kannað eftir, um menn hava neyðug loyvi og prógv til vhf sendaran.

– Men skulu vit røkja tað uppgávuna, skulu vit hava bát og fara út á fiskileiðirnar. Og tann bátin hava vit ikki og tað er ógvuliga lítið, sum bendir á, at vit nakrantíð fáa hann, sigur hann.

Annars ger Fjarskiftiseftirlitið tað viðhvørt, at tað stendur fyri bátum, tá ið teir koma til lands og biðja um at síggja neyðug loyvi og prógv.

Eru loyvini ikki ílagi, verða menninir meldaðir og tað kemur meiri enn so fyri. Men at kanna bátar úti á fiskileiðum, hava vit ongan møguleikan til.

Men tað kundi Fjarskiftiseftirlitið væl hugsa sær.

Tí tekur hann eisini væl ímóti hugskotinum um eitt samstarv við Fiskiveiðieftirlitið.

– Ein partur av hesum samstarvi kundi verið, at fólk frá Fjarskiftiseftirlitinum við jøvnum millumbili fór við skipum frá Vaktar og Bjargingartænastuni út á fiskileiðirnar at kanna skip og bátar.

Ein annar máti kundi verið, at Vaktar og Bjargingartænastan sjálv tók sær av hesum eftirlitinum og boðaði Fjarskiftiseftirlitinum frá, tá ið login varð brotin og bátar ikki høvdu neyðug loyvi og prógv umborð.



# Vanrøkt av sálarsjúklingum

**– Trupulleikin, sum psykiatrisku deildirnar hava at dragast við, hongur neyvt saman við tí eg loyvi mær at kalla vanrøkt av sjúklingum, sum so avgjørt ikki kunnu hóma ein glotta fyri framman, so leingi sjúkrahúsverkið framhaldandi skal eitast at vera teirra heim, sigur Katrin Dahl Jakobsen, sum vil hava landsstýrismannin í almannamálum at svara fyrispurningi um bústaðir til sálarsjúklingar**

FYRISPURNINGUR
*Eirikur Lindenskov*



*Páll á Reynatúgvu skal svara fyrispurningi frá Katrini Dahl Jakobsen um bústaðir til sálarskúlingar, sum eru liðugt viðgjørdi á Landssjúkrahúsinum*

– Er bygginevnd sett at fyrireika bygging av sambýli í Havn, sum mælt varð til í álitinum »Ein glotti fyri framman«.

Hesum spurningi – og nøkrum afturat, skal Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum svara Katrini Dahl Jakobsen, løgtingskvinnu Javnaðarfloksins.

Tingkvinnan vil hava landsstýrismannin at greiða tinginum frá viðurskiftum viðvíkjandi liðugt viðgjørdum sjðúklingum á psykiatrisku deildunum á Landssjúkrahúsinum.

Hon vil hava at vita, um nevndin hevur eitt ítøkiligt uppskot um bústovn, hvat slag av bústovni talan er um, hvussu nógv hann fer at kosta og nær hann verður liðugur.

Hon vil eisini hava landsstýrismannin at greiða frá teimum 3,5 milliónum krónunumm sum játtaðar vóru á fíggjarlógini fyri 2001. Hon spyr eisini landsstýrismannin, um hann er samdur við tilmælinum í álitinum um at raðfesta Suðurstreym, tá tað ræður um psykiatrisku sjúklingarnar.

At enda spyr hon, um landsstýrismaðurin ætlar at leggja fram »álitið um skipan av framsóknari psykiatri í Føroyum« til politiska viðgerð.

Katrin Dahl Jakobsen sigur í viðmerkingum til fyrispurningarnar, at á heysti í 2000 skipaði felagið Sinnisbati fyri almennum fundi á Landssjúkrahúsinum, tá kjakast varð um um psykiatrisku deildirnar á Landssjúkrahúsinum og teir sjúklingar, sum hóast liðugt viðgjørdir, sleppa ikki av aftur psykiatrisku deildunum orsakað av vantandi bústaði.

– Umframt fakfólk vóru allir politisku flokkarnir eisini umboðaðir á fundinum. Breið semja var um, at hesi rsjúlingar liva undir stak óvirðiligum og lítið mennandi umstøðum, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

Hon sigur eisini, at spurningurin um tað bæði fakliga og búskaparliga skilaleysa í at binda liðugt viðgjørdar sjúklingar til eina sjúkrasong varð eisini viðgjørdur.

– Aftur her vóru øll á einum máli um, at rættast var, um psykiatrisku deildirnar fingu arbeitt, soleiðis sum slíkar eru ætlaðar at gera, tað vil siga, sum viðgerðardeildir burturav, og at pengur til hetta endamál eisini tá hevði verið drúgvari, heldur hon.

Eitt av hesum fundi var, at ein millión krónur vórðu settar av til kanningar av støðuni innan føroyska psykiatri. Síðani tá eru tvey álit hesum viðvíkjandi kom in. Hitt fyrr kallast »Ein glotti fyri framman«, tað kom í apríl í fjør, og snýr seg fyri tað mesta um tørvin á bústøðum. Hitt seinna álitið kom í ár, og tað er um skipan av framsóknari psykiatri í Føroyum.

– Afturat hesum lat ein arbeiðsbólkur fyrst í nítiárunum úr hondum álitið »Psykiatriætlan ár 2000«. Við øllum hesum tilráðingum, um framt tað onnur feløg og fakfólk hava víst á, er ríkiligt av vitan til taks fyri skilagóðum loysnum, teimum sálarsjúku at gagni, heldur Katrin Dahl Jakobsen.

Álitið »Ein glotti fyri framman« mælir til at byrjað verður í miðstaðarøkinum, har tørvurin er nógv størstur. Har verður mælt til

- at bygginevnd verður sett beinanvegin at fyrireika bygging av tí fyrsta sambýlinum til 10 fólk í Havn

Kartin Dahl Jakobsen sigur, at partur av arbeiðssetninginum eisini var at koma við uppskoti um, hvussu farast skuldi ígongd við at brúka tær 3,5 mió. kr., sum settar vóru av til íløgur í 2001.

– Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003 er løgujáttan til bústovnar 5 mió. kr. Í viðmerkingunum verður víst á, at umleið 40 fólk, sum ikki eru í viðgerð, búgva á psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum, tí annað búpláss er ikki til teirra. Hetta er sama tal, sum álitið vísir á, og at næstan øll høvdu tilknýti til suðurstreym, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

– Trupulleikin, sum psykiatrisku deildirnar hava at dragast við, hongur neyvt saman við tí eg loyvi mær at kalla vanrøkt av sjúklingum, sum so avgjørt ikki kunnu hóma ein glotta fyri framman, so leingi sjúkrahúsverkið framhaldandi skal eitast at vera teirra heim. Heldur eingin glotti er fyri framman fyri okkara fakfólki, koma tey ikki úr stað og fáa umstøður at menna seg sjálvi og deildirnar til at verða viðgerðardeildir við serdeildum fyri hesar ymsu sjúklingabólkarnar.

Tá trýstið á hesar deildirnar er so mikið stórt, er umráðandi at sett verður á í rætta endanum og í røttu raðfylgju, heldur Katrin Dahl Jakobsen.

# Møguleikar hjá fjølbrekaðum børnum

**Heðin Mortensen vil hava Páll á Reynatúgvu at greiða tinginum frá møguleikum hjá fjølbrekaðum børnum**

FYRISPURNINGUR
*Eirikur Lindenskov*



*– Hvørjar niðurstøður hevur landsstýrismaðurin gjørt sær í sambandi við royndarskipanina við dagtilhaldi fyri fjølbrekað børn úr Nes og Runavíkar kommunu? Hetta er ein av spurningunum, sum Heðin Mortensen, tingmaður fyri Sambandsflokkin, vil hava landsstýrismannin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, at svara*

– Hvørjar niðurstøður hevur landsstýrismaðurin gjørt sær í sambandi við royndarskipanina við dagtilhaldi fyri fjølbrekað børn úr Nes og Runavíkar kommunu?

Hetta vil Heðin Mortensen, tingmaður fyri Sambandsflokkin, hava landsstýrismannin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, at svara. Hann spyr eisini landsstýrismannin, um hann hevur nakrar ætlanir um framhaldandi dagtilhald fyri fjølbrekað børn aftan á 31. desember 2002, tá løgtingslogin (nr. 71 frá 2. mai 2001) fer úr gildi.

Heðin Mortensen spyr eisini – um svarið er ja – um nakrar ætlanir tá eru um at víðka tilboðið til eisini at fevn aum aðrar partar av landinum, t. d. Tórshavnar Kommunu.

Í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt er í § 5 ásett, at til børn við serligum tørvi verða veittar nøktandi hølisumstøður og viðgerar- og námsførðklig tilboð sambært serligari lóggávu.

– Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvørja serliga lóggávu her verður skipa til?, spyr Heðin Mortensen, sum eisini vil hava landsstýrismannin at siga tinginum, nær hann ætlar at leggja eina slíkan ætlan fyri tingið, um eingin serlig lóggáva finst.

Sambært § 6 í lógini um royndarskipan fyri fjølbrekað børn úr Nes og Runavíkar kommunu skuldi yrkiskøn nevnd meta um royndarskipanina og lata almannastjóranum frágreiðing í seinasta lagi 1. juli 2002. Landsstýrismaðurin hevur tí havt stundir til at gjørt sær sínar metingar av royndunum.

– Tórshavnar kommuna hevur av sínum eintingum í nøkur ár leigað Bridgehúsið sum tilhaldstað hjá nøkrum brekaðum skúlabørnum og stuðlum teirra. Hóast vánaligar umstøður hava stuðlarnir tó eftir førimuni gjørt eitt sera gott arbeiði. Hetta er bert ein neyðloysn, sum tó als ikki er nøktandi, hvørki fyri tann brekaða, foreldrini ella stuðulin, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur eisini, at ein møguleiki er, at stovnurin í Bridgehúsinum flytur út á Sernámsdepilin og virkar har sum ein frítíðarskúli.

– Á fleiri økjum hevði hetta verið ein góð loysn. Hølisviðurkiftini eru góð, barnið hevði ikki havt fyri neyðini at skift um hvørvi, og tíð hevði ikki fari til spillis við flutningi,. sigur Heðin Mortensen, sum leggur afturat, at teir fysisku karmarnir høvdu her verið til staðar fyri at ment eitt samstarv millum lærararnar á skúlanum og starvsfólkið í frítíðarskúlanum. Kanska landsstýrismaðurin kann siga sína hugsan og ætlan á hesum øki.

Í lógini um dagstovnar og dagrøkt er í § 5 ásett, at til børn við serligum tørvi verða veittar nøktandi hølisumstøður og viðgerðar- og námsfrøðilig tilboð sbr. serligari lóggávu. Í sambandi við at Tórshavnar kommuna bygdi nýggjan dagstovn í Øksnagerði, varð eisini gjørd ein serstova, ætlað børnum við sertørvi. Tað er tó framvegis ikki eydnast kommununi at fáa at vita, hvussu børnini við sertørvi kunnu fáa veittar nøktandi hølisumstøður og viðgerðar- og námsfrøðilig tilboð. Kommunan hevur tí lítlan møguleika fyri at taka hædd fyri tørvinum hjá hesum børnum í útbyggingini av dagstovnatilboðunum í kommununi.